Landsstýrið:

# Fylgir Noregi og Íslandi og hækkar sildakvotuna

**- Føroyska kvotuhækkingin fylgir norsku og íslendsku hækkingunum, tó soleiðis, at lagt verður upp fyri, at føroyingar í upprunaligu strandalandaavtaluni hava rindað fyri atgongd at fiska sild í norskum sjógvi, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður**

NORÐHAVSSILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, hevur í vikuni gjørt av at hækka føroysku kvotuna av norðhavssild úr umleið 48.000 tonsum upp í 68.000 tons.

Í 1996 gjørdu strandalondini, ES, Føroyar, Ísland, Noreg og Russland, avtalu um býtið av norðhavssild, og eftir hesi avtalu fingu Føroyar tillutað 5,46% av samlaðu sildakvotuni. Avtalan varð endurnýggjað á hvørjum ári til og við 2002 – og bæði í 2003 og í 2004 hildu strandalondini seg til býtið í avtaluni frá 1996.

### Fylgja grannunum

Bjørn Kalsø vísir á, at ICES hevur mælt til eina samlaða kvotu (TAC) fyri 2005 upp á 890.000 tons.

- Í februar boðaði norska fiskimálaráðið frá, at Noreg hevði tillutað sær 578.500 tons av samlaðu kvotuni fyri 2005. Hetta svarar til 65% av samlaðu kvotuni, hóast Noreg eftir avtaluni frá 1996 fekk tillutað 57%. Hetta merkir, at Noreg hevur hækkað sín part av sildakvotuni við 14%. Seinni hevur eisini Ísland boðað frá, at teirra sildakvota er hækkað samsvarandi norsku hækkingini.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann byggir sína avgerð á somu hækkingarnar, sum norðmenn og íslendingar hava tillutað sær.

- Tó soleiðis, at lagt verður upp fyri, at føroyingar í upprunaligu strandalandaavtaluni hava rindað fyri atgongd at fiska sild í norskum sjógvi, sigur hann.

### Býtið av sildini

Føroyska kvotan á 68.000 tons verður býtt soleiðis, at 59.541 tons fara til nótaskipini, meðan 5.000 tons verða tillutað ídnaðarskipunum sum felagskvota. Restin av hækkingini - ella 3.459 tons – verður eftirhildin til seinni útlutan.

- Broytingar kunnu verða gjørdar í hesum býti, um tað stendur á at fiska alla kvotuna, eins og eg leggi dent á, at kvotuásetingin og býtið millum skipabólkarnar ikki skapar fordømi frameftir.

Bjørn Kalsø vísir á, at støðan í 2005 er serstøk, tí eingin avtala er millum strandalondini um norðhavssildina.

Hann sigur seg vóna, at tað í 2006 fer at eydnast londunum at gera eina avtalu um sildafiskiskapin.

- Tí eigur henda avgerð um kvotu og býti millum bólkarnar ikki at skapa fordømi, sigur landsstýrismaðurin, sum eisini hevur avgjørt at tilluta ídnaðar-og nótaskipum 1.200 tons av sild í Norðsjónum. Hetta er sild, sum Føroyar hava fingið í fiskiveiðiavtaluni við ES og Noreg.



*Fiskirannsóknarstovan mælir til ymiskar skerjingar fyri ymiskar skipabólkar*

# Skjót avgerð um fiskidagar

**Fiskirannsóknarstovan mælir til, at fiskidagarnir hjá línuskipum, útróðrarbátum við línu og snellu og lemmatrolarum við maskinorku undir 500 hk verða skerdir við 30% komandi fiskiár**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskirannsóknarstovan hevur nú latið landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, sítt tilmæli um fiskidagar fyri komandi fiskiár.

Um toska-, hýsu-og upsaveiðina fyri fiskiárið, 2005/2006, hevur Fiskirannsóknarstovan í høvuðsheitum hesi tilmæli:

**1.** At fiskidagatalið hjá línuskipum, útróðarbátum við línu og snellu og lemmatrolarum við maskinorku undir 500 hk (Bólkur 3, 4 og 5) verður minkað við 30% og í fiskiárinum 2006/2007 við øðrum 10%.

**2.** At serliga toska-og hýsukvotan hjá lemmatrolarum yvir 500 hk (Bólkur 1) verður tikin av.

**3.** At fiskidagatalið hjá partrolarum (Bólkur 2) í fiskiárinum 2005/2006 verður minkað við 15% og í fiskiárinum 2006/2007 við øðrum 10 %.

**4.** At dagatalið á Føroyabanka verður minkað niður á árliga støðið í 1996-2002.

**5.** At serligu gýtingarfriðingarnar fyri tosk á landgrunninum, tosk á Føroyabanka og upsa undir Føroyum eiga at halda fram.

Um eina slaka viku kemur skipanarnevndin við sínum tilmæli um fiskidagar fyri komandi fiskiár.

### Skjót avgerð

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur heft seg við, at Fiskirannsóknarstovan hesaferð ikki mælir til skerjingar yvir ein "kamb", sum hon hevur gjørt undanfarin ár, men mælir til ymiskar skerjingar hjá ymisku skipabólkunum.

Spurdur, um hann fer at fylgja tilráðingunum hjá Fiskirannsóknarstovuni, sigur landsstýrismaðurin, at tað dugir hann einki at siga um í løtuni.

- Um nakrar dagar fái eg tilmælið hjá fiskidaganevndini, og tá fari eg at meta um støðuna.

Landsstýrismaðurin sigur, at um Fiskirannsóknarstovan heldur, at trýstið á fiskastovnarnar er ymiskt – hjá ymisku skipabólkunum, eigur stovnurin sjálvandi at gera vart við tað. Hinvegin var vinnan við til at gera fiskidagaskipanina, og tí kann tað skapa trupulleikar, um møguligar skerjingar verða ymiskar – frá einum skipabólki til annan.

- Men, leggur hann aftrat, at semja er kanska ikki millum skipabólkarnar kortini.

Bjørn Kalsø vísir á, at hann hevur havt ein 3-mannabólk sitandi, sum hevur hugt at veiðitrýstinum.

- Metingin hjá bólkinum er, at veiðitrýstið er økt, hóast veiðiloyvini eru færri, men økingin er eftir øllum at døma ikki so ógvuslig.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann fer at hava øll hesi viðurskifti í huga saman við teimum veruleikum, sum eru, tá ið hann fer at áseta fiskidagatalið fyri komandi fiskiár.

- Eg havi ætlað mær at tikið eina rímiliga skjóta avgerð um fiskidagarnar, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

# Ídnaðarskipini fáa nú part av norðhavssildini

**- Eg havi tikið hetta stigið fyri at økja um okkara møguleikar at fiska ásettu sildakvotuna, men eg havi samstundis lagt dent á, at hetta ikki skal skapa nakað fordømi, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður**

ÍDNAÐARSKIPINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fráboðanin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, nú hann hevur avgjørt at hækka føroysku kvotuna av norðhavssild, sleppa ídnaðarskipini nú eisini upp í part. Tey sleppa nevniliga at fiska 5.000 tons av tilsamans 68.000 tonsum, sum verður felagskvota hjá hesum skipum.

Millum nótamenn hava ídnaðarskipini verið "svarti seyðurin", síðan hesi skip vórðu keypt út av grunninum fyri fleiri árum síðan. Teir, sum eiga ídnaðarskipini, hava hinvegin ført fram, at eingin orsøk er, at føroysk kvota liggur ófiskað, tá ið árið er úti. Tí hava teir afturvendandi havt ynski um at fáa ein part av teimum kvotum, sum landsstýrið ræður yvir.

Bjørn Kalsø vísir á, at hann hevur tillutað ídnaðarskipum kvotu av norðhavssildini fyri at økja um møguleikarnar fyri, at føroyska kvotan verður fiskað.

- Tað er ikki soleiðis, at nótaskipini hava mist nakað. Her er einki broytt, men tillutaða kvotan hjá ídnaðarskipum er komin aftrat kvotuni, sum var frammanundan.

### Ikki fordømi

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at býtið av norðhavssildini, nú eingin semja er millum standalondini, ikki skal skapa nakað fordømi, tí óvist er, hvussu stór samlaða kvotan verður framyvir.

- Vit vóna, at semja fæst millum strandalondini um samlaðu kvotuna av norðhavssild – og býtið av henni, sigur Bjørn Kalsø, sum í vikuni avgjørdi at fylgja norðmonnum og íslendingum og hækka føroysku kvotuna samsvarandi hækkingini hjá grannunum fyri eystan og vestan.



*Ídnaðarskipini sleppa nú eisini at fiska norðhavssild*